# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan´00, Km 64.500 .
Kr. 99.000.



**CITROEN XANTIA 2.0HDI 5H**
Árg Jun´99, Km 43.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI GALANT 2.0**
Árg Juni´92, Km 150.000 .
Kr. 37.000.



**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Juni´01, Km 16.000 .
Kr. 210.000.



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb´99, Km 50.000 .
Kr. 87.000.



**PEUGEOT 306 1.9D 4H**
Árg Apríl´95, Km 152.000 .
Kr. 80.000.



**CITROEN XSARA 1.9HDI 5H**
Árg Juni´99, Km 117.000 .
Kr. 137.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mars´99, Km 45.000 .
Kr. 160.000.



**MITSUBISHI CARISMA 1.6I 5H**
Árg Mars´97, Km 64.000 .
Kr. 105.000.



**FORD ESCORT VAN75 1.8D**
Árg Mei´95, Km 128.000 .
Kr. 55.000.



**AUDI A4 1.6 4H**
Árg sept´96, Km 77.500 .
Kr. 152.000.



**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
Árg Aug´99, Km 36.000 .
Kr. 115.000.



**CITROEN XSARA 1.6I STC**
Árg Apr´99, Km 36.000 .
Kr. 133.000.



**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apríl´00, Km 27.500 .
Kr. 105.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

LÝSIÐ
við



brúktum
bilum

# ítróttur

Nr. 149 • hósdagur • 8. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Kvinnuunglingalandsliðið til NM



FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Føroyska kvinnuunglingalandsliðið í flogbólti fer hósdagin 8. august til Noregs at leika við í kappingini um Norðurlendska meistaraheitið.

Sum tað framgongur, so er Vágoyggin best umboða á liðnum við heili 7 leikarum, meðan hini koma úr Kollafirði, Sundalagnum og Havn.

Luttakandi liðini í kappingini vera Noreg, Svøríki, Finnland, Danmark og Føroyar.

Liðið hevur vant nógv saman, men um hetta verður nokk til at vinna á hinum Norðurlendsku liðunum, er ivasamt, tí tað verða sterk lið, sum Føroyar skulu leika ímóti, og um mett verður í mun til úrslitini seinastu árini, so hava Føroya altíð endað aftast í hesi kapping.

Kappingin byrjar komandi fríggjadag og endar sunnudagin og allir dystirnir vera leiktir í Tønsbjerg.

Føroysak liðið verður aftur í Føroyum mánadagin 12. august og høvuðsstuðul hjá liðnum er Føroya Sparikassi.

**Venjararnir hjá kvinnuunglingunum Elisabeth S. Rasmussen og Rosa Jacobsen hava úttikið hesar leikarar til kappingina:**

| | | |
|---|---|---|
| Kristina Jørgensen | 170 | Fleyr |
| Martha Johannesen | 168 | Nøvan |
| Elin Doris Dam | 158 | Dráttur |
| Anly Joensen | 159 | Dráttur |
| Angelie Johannesen | 167 | KÍF |
| Biritha Joensen | 176 | KÍF |
| Karin Mikkelsen | 166 | SÍ |
| Vivian Mikkelsen | 174 | SÍ |
| Annika Niclasen | 172 | SÍ |
| Marit Jacobsen | 174 | SÍ |
| Torfríð Davidsen | 165 | SÍ |

## VÍF orkar ikki at kappast úti í Evropa

**Bæði fíggjarligar- og ítróttarligar umstøður hava við sær, at mans- og kvinnuliðið hjá VÍF ikki fara at luttaka í Evropa Cup í ár.**

EVROPA CUP HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Fyrradagin varð drigið í teimum fýra evropeisku kappingunum í hondbólti, og sambært yvirlitinum verður onki føroyskt felag við í ár.

Vestmenningar vunnu bæði mans- og kvinnudeildina í fjør, og harvið hevði felagið rætt til at boða frá luttøku í kappingunum fyri meistaralið hjá kvinnum og monnum, men fíggjarliga- og ítróttarliga umstøðurnar hava við sær, at felagið hevur avgjørt ikki at luttaka í Evropa Cup í ár

### Ov tungt

Leikandi venjarin hjá mansliðnum hjá VÍF, Ingi Olsen, er ikki í iva um orsøkina til, at onki føroysk felag verður við í Evropa Cup í ár

- Tann fíggjarliga byrðan er ov tung, og tað er avgjørt størsta orsøkin til, at vit ikki hava boðað frá luttøku í ár, sigur Ingi Olsen

Ingi greiðir frá, at um ein eitt nú samanber hondbóltin við fótbóltin, so fær FSF luttøkugjald frá UEFA til føroyska luttøku í Evropa Cup, meðan í hondbóltinum er tað feløgini sjálvi, sum mugu gjalda luttøkugjaldið.

Umframt luttøkugjald, so skulu ferðirnar uttanlands eisini fíggjast. Fíggingin krevur eisini nógv av einstøku spælararnum, tí meginparturin av summarfrítíðini verður nýttur ymisk tiltøk, so peningur fast til til vega.

- Vísir tað seg so, at man er so heppin at vinna seg víðari í kappingini, so skulu pengar aftur fáast til veða, og tað er nærmast ómøgulig krøv at seta leikararum, ið bert hava hondbóltin sum ítrív, sigur greiðir Ingi Olsen frá

Vónirnar fyri at koma víðari eru vanliga ikki serliga góðar, og tí tykist ofta skilaleyst at nýta so stóra orku uppá evropeisku luttøkuna, vísur Ingi eisini á.

### Ávirkar heimliðu kappingina

Umframt fíggjarligu viðurskiftini, so hevur tað víst seg seinnu árini, at evropeisk luttøka avgjørt ávirkar heimligu kappingina.

- Vanliga mynstrið hevur verið, at vit hava staðið okkum rættiliga væl í byrjanini av landskappingini, men tá komið er til jólar, so versnar venjingarstøðan hjá leikararnum, sigur venjarin hjá VÍF

Skulu føroysku liðini hava likínda venjingarstøðu til evropeisku dystirnar, ið vanliga liggja síðst í august mánaði, so er neyðugt at leggja til brots longu í juni mánaði. Hetta er góðar tveir mánaðir, áðrenn flestu føroysku feløgini fara undir venjingarnar, og tí hava spælararnir, ið luttaka í Evropa Cup, vant tveir mánaðir longri enn hinir føroysku leikararnir.

-Á jólum orka spælararnir ikki meira hondbólt, og hetta hevur ofta havt við sær, at vit hava tapt fleiri dystir um jóltíðir, sigur Ingi Olsen

### Slagelse royna seg fyri fyrstu ferð

Liðið hjá Anju Andersen, Slagelse, eru fyri fyrstu ferð við í evropeiskari kapping. Jacklyn Djurhuus og Katrin á Neystabø vóru í Slagelse fyri nøkrum árum síðani, og sigast má, at felagi er komi langt síðani.

Felagið var tá í næstbestu deildini, og eftir uppflytingina, endaði Slagelse á fimta plássi í fjør, sum gevur rættin evropeiska luttøku.

Slagelse skal royna seg í EHF-Cup ímóti einum grikskum liðið, og í Slagelse hava tey góðar vónir, tí liðið er munandi styrkt í ár við m.a. Fridriskas úr Ungarn, sum var toppskjútti í HM endaspælinum í fjør.

## Rógvi Johansen gjøgnumførdi ikki

**Í kappingini sá ein rættiliga, hvussu stórur munur er á, yrkis- og amatørsúkkling**

SÚKKLING
*Páll Holm Johannesen*

Vágbingurin, Rógvi Johansen, luttók í stórari súkklukapping í seinastu viku. Talan var um Grand Prix CSC Scandihealt, ið er ein av størru súkklukappingum í Danmark. Flestu luttakarar vóru yrkissúkklarar burturav, so føroyingurin hevði ikki so góðar vónir undan kappingini.

### Tyler Hamilton vann

Vinnarin av kappingini gjørdist Tyler Hamilton, ið súkklar fyri súkklufelagið hjá Bjarne Riis, CSC Tiscali. Umframt CSC Tiscali, so luttóku eisini Team Fakta, Team Coast og US Postal, sum øll eru von við at standa seg væl í stórum súkklukappingum kring Evropa.

Vinnarin av Grand Prix CSC Scandihealt, Tyler Hamilton, er ikki hvør sum helst. Hann endaði á øðrum plássi í Giro de Italia fyrr í ár, og Tour de France stóð Tyler Hamilton seg eisini væl, so ongin varð ovfarin av, at hann vann kappingina

### Rógvi gjøgnumførdi ikki

Tá 50 km írestaðu av kappingini gavst Rógvi Johansen, og sambært Rógvi , so var hetta als ikki óvæntað.

– Í einari slíkari kapping, har flestu luttakararnir eru yrkissúkklarar, sær ein hvussu stórur munur er á yrkissúkkling og amatørsúkkling, og tí hevði eg ikki væntað frammanundan at gjøgnumført kappingina, segði Rógvi Johansen.

Rógvi vísti eisini á, at bert tveir amatørar megnaðu at gjøgnumføra, og at tað sigur nógv um hvussu sterk kappingin var mannað.

Spurdur um gongdina í súkklukoyringini, svaraði Rógvi, at longu eftir hálvan tíma, hevði hann mist teir fremstu súkklararnar, og mátti hann stóran part av kappingini súkkla einsamallur.

Rógvi Johansen var ikki keddur eftir kappingina, - Hetta er ótrúliga læruríkt og spennandi, og tað er ikki á hvørjum degi, ein sleppur at royna seg ímóti so sterkum súkklarum sum Tyler Hamilton, greiðir Rógvi frá.

### Kappast aftur um vikuskiftið

Rógvi skal aftur í kapping um vikuskiftið, har hann ikki skal luttaka í minni enn tveimum súkklukappingum. Í morgin er talan um eina gøtukoyring í Odder, og sunnudagin skal Rógvi royna seg í Fyn Rundt.